**Minningarhald, sjólátin**

**Formæli:** Eftir áheitan frá biskupi møttust í biskupsgarði hin 4. desember 2014 umboð fyri Løgmansskrivstovuna, Reiðarafelagið, Maskinmeistarafelagið, Fiskimannafelagið, Stuðulsgrunnin fyri Óarbeiðsførar Fiskimenn, Vørn, MRCC, Mentamálaráðið, Skipara og Navigatørfelagið Sjómansmissiónina, við biskupi og starvsfólki hansara at umrøða minningarhaldið fyri sjólátnar Føroyingar og ábyrgdin av listanum við nøvnum teirra, ið farin eru.

Ásannandi, at skipanin var farin á glið, og at neyðugt var at gera almenn metingarstøði, so at neyvt ber til at siga, hvør skal verða nevndur á listanum, var semja um at seta eina nevnd at gera uppskot til metingarstøði, grundað á gomlu løgtingssamtyktina og á umrøðuna á fundinum. Í nevndini skuldu vera:
eitt umboð fyri manningarfeløgini og Reiðarafelagið,
eitt umboð fyri Vørn
eitt umboð fyri Mentamálaráðið og Løgmansskrivstovuna, og
eitt umboð fyri Fólkakirkjuna og Sjómansmissiónina.

Í nevndina komu:
Anfinnur Garðalíð fyri manningarfeløgini og Reiðarafelagið,
Edvard Bjarnason fyri Vørn
Bergur Berg fyri Mentamálaráðið og Løgmansskrivstovuna, og
Torleif Johannesen fyri Fólkakirkjuna og Sjómansmissiónina

Nevndin hevur havt tveir fundir, umframt nakað av skrivligum samskifti.

Semja er í nevndini um, at neyðugt er, at greiðar avmarkingar eru fyri, hvør kemur á listan, so at ivamálini verða so fá sum til ber.
Óneyðug umrøða skal ikki vera um, hvør eigur a verða nevndur á listanum.
Uttan mun til, hvar markið verður sett, kann altíð finnast okkurt markamót, har tað ivi kann verða, hvør kemur á listan ella ikki.
Tí er neyðugt, at støðið undir listanum eru greiðar reglur, so ivamálini eru so fá, sum til ber.

Somuleiðis er semja um, at tann týdningur, sum eftir øllum at døma upprunaliga var ætlaður at leggja í hugtakið ”sjólátnir” við einmæltu løgtingssamtyktini, framvegis hevur so stóran týdning, at hetta er støðið, sum gingið verður út frá.

Listin er til almenna minningarhaldið, har bæði løgmaður og biskupur luttaka.

Einki er til hindurs fyri, at minningarhaldini kring landið annars kunnu vera hildin um onnur, sum eru farin, uttan mun til um tey eru við á hesum lista.

Av tí at talan er um eitt føroyskt minningarhald, ber illa til – vísandi til løgtingssamtyktina í 1948 “*.....til minnis um sjólátnar Føroyingar*” – at finna aðra avmarking enn við fortreytina um at tann, sum kemur á listan, býr í Føroyum.

Ásannandi, at samfelagið er eitt heilt annað, enn tá ið hetta minningarhaldið byrjaði, var semja um hesar fortreytir og hesa allýsing:

*Tann, sum kemur á listan:*

*Skal vera skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum at búgva í Føroyum.*
*Skal hava latið lív í sínum yrki á sjónum, av sjúku ella vanlukku.*

*Allýsing:*
*Á sjónum merkir her á skipi, báti, øðrum vinnustaði á sjónum, ella í sjónum.*

Við hesum sendir nevndin, sum varð sett at gera biskupi uppskot til metingarstøði um, hvør eigur at verða nevndur á listanum, sum verður lisin upp á almenna minnigarhaldinum allahalgannadag, umbidna uppskotið.

**Vegleiðandi viðmerkingar**

Markið kemur við hesum at vera soleiðis, at:

- Skrásetti bústaðurin avgerandi. Hetta vil siga, at:
    - Útlendskur ríkisborgari, sum er skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum at búgva í Føroyum og sum letur lív í sínum yrki á sjónum, av sjúku ella vanlukku, kemur eins og aðrir føroyingar á listan.
    - Danskur ríkisborgari, sum ikki er skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum at búgva í Føroyum og sum letur lív í sínum yrki á sjónum, av sjúku ella vanlukku, kemur eins og aðrir útlendingar ikki á listan, uttan mun til, um hann t. d. er vaksin upp í Føroyum.
- Tann, sum letur lív í sínum yrki á sjónum, kemur á listan, uttan mun til, hvar skipið, báturin, ella annar vinnustaðurin á sjónum, sum hann er við, er skrásett at hoyra heima – og uttan mun í hvørjum sjóøki tilburðurin fór fram.
- Avgerandi er, at tann, sum farin er, hevur latið lív á sjónum. Hetta vil siga, at:
    - Til dømis ein sjómaður, sum doyr í landi, meðan skipið er í útlendskari havn, kemur ikki á listan. Hetta uttan mun til, um hann t. d. doyr á sjúkrahúsi, á skrivstovuni hjá umboðsmanni ella viðskiftafólki felagsins á staðnum, ella verður fyri vanlukku á havnarlagnum undir lossing.
    - Til dømis ein sjómaður, ella ein í frálandavinnu, sum ferst undir ferðing til ella frá vinnustaðnum, kemur ikki á listan.
    - Til dømis ein lossingarmaður, sum doyr á keiini, kemur ikki á listan – mótsett einum lossingarmanni, sum doyr umborð á skipi undir lossing.
- Avgerandi er, at tann, sum farin er, hevur latið lív í vinnu. Hetta vil siga, at:
    - Tann, sum er farin á flot í frítíðini, kemur ikki á listan, hóast hann ferst av vanlukku.
    - Tann, sum dettur oman, ferst í bilvanlukku ella í flogvanlukku, kemur ikki á listan.
    - Ferðafólk við skipi kemur ikki á listan, uttan mun til um tað doyr umborð ella fer fyri borð.
    - Onnur, sum til dømis fólk við fiski/hummaraloyvi, fólk frá verkstøðum og líknandi eru í hesum sambandi at rokna sum í ”sínum yrki”.

Summar av hesum avmarkingum kunnu tykjast heldur strangar, men nevndin metir eftir neyvt umhugsni ikki, at til ber at finna frægari hátt at gera avmarkingina (sum kann føra til færri støður við ivamálum), enn soleiðis sum nevndin skjýtur upp her.